# Smyril legði seg 58 stig



*Dekametrið umborð á Smyrli vísur 58 stig. Fyri 10 árum legði Smyril seg 58 stig á veg heim úr Aberdeen. Petur Dahl Nolsøe eigur myndina, sum hevur hingið umborð á Smyrli og tí er heldur illa farin og kámað av ljósinum*

**At skip leggja seg í ringum veðri er ikki óvanligt, hóast nógv hevur verið gjørt burturúr, at Smyril herfyri legði seg 42 stig á veg til Suðuroyar. Smyril hevur mangan brattan farið og prómfast er, at hann í 1994 legði seg 58 stig**

SAMFERÐSLA
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Herfryi legði Smyril seg 42 stig á veg til Suðuroyar. Veðrið var heldur vánaligt, men túrurin var góður, men brádliga kom skipið í ringan sjógv og legði seg 42 stig, tá skipið fekk rættulig brot. Alt hendi brádliga og kom sera óvæntað og helst hevur hetta gjørt sítt til, at ferðafólk fingu skelk og at fjølmiðlar hava gjørt burtur úr ferðini.

Men Smyril hevur mangan brattan farið, síðani skipið kom til Føroya miðskeiðis í sjeytiárunum. Og í nøkur ár sigldi Smyril millum lond, t.d. til Aberdeen.

Á eini ferð heim úr Aberdeen í 1994 var Smyril í ringum veðri og fekk risastór brot. Hetta var útfyri Dennis Head. Skipið legði seg heili 58 stig. Ein av manningini, Petur Dahl Nolsøe, tók mynd av dekametrinum, ið er tíl sum vísir, hvussu nógv stig skipið leggur seg. Har er prómfast, at skipið hevur lagt seg 58 stig. Hvørt tað so er met hjá Smyrli, sigur søgan hinvegin einki um. Men Petur minnist, at trailararnir um borð vóru tómir henda túrin og tað fegnast hann um, tí óivað hevði støðan verið hættisligari, um meira vekt var umborð.

Myndin hevur síðani túrin hingið á brúnni umborð á Smyrli og er í dag heldur illa farin, tí ljósið er farið við henni. Petur Dahl Nolsøe hevur tí tikið myndina til hús, eisini havandi í huga, at nú styttist, til skipið verður tikið úr suðuroyarsiglingini, tí ein nýggjur og betri Smyril skal røkja farleiðina um Suðuroyarfjørð, ið sum kunnugt hevur bæði sól og logn og myrkur og vind at bjóða teimum ferðandi.


UMBOÐSRÁÐSVAL 2004



## Verið við at velja

**Í ár 2004 skulu 11 limir veljast til Umboðsráðið fyri Ognarfelag Tryggingartakaranna**

INNKOMIN VALEVNI ERU HESI:
Árni Jakobsen, Smærugøta 19, Tórshavn
Atli Hansen, Norðragøta
Birgir Waag Høgnesen, Vestmanna
Brynhild í Jákupstovu, Tvørgøta 9, Tórshavn
Djóni Ziska, Millum Gilja 7, Hoyvík
Emil Jacobsen, Skála
Elin Heðinsdóttir Joensen, Hoyvíksv. 22a, Tórshavn
Erling Dalsgaard, Dalagøta 11, Tórshavn
Heini Lützen, Kristiansgøta 23, Hoyvík
Herman Winther, Skopun
Hervør Hergudóttir, Bøur
Ingeborg Godtfred, Garðsgøta 21, Argir
Jákup Egholm Hansen, Sandavágur
Jógvan Durhuus, Vestmanna
Jógvan L. Rasmussen, á Frælsinum 8, Tórshavn
Jóhan Mortensen, Spógvavegur 57, Tórhavn
Jona Ulrikka Nielsen, Undir Fossum 44, Klaksvík
Klæmint Olsen, Vesturgøta 14, Tórshavn
Marin í Dali, Tórsbyrgi 10, Tórshavn
Poul Johannes Joensen, Vágur
Regin Hammer, Hanusargøta 7, Tórshavn
Rói Egholm, Hagagøta 6, Argir
Ronald Poulsen, Turiðargøta 27, Tórshavn
Súni Vinther, Hvarvið 1, Tórshavn
Tummas Jacobsen, Spógvavegur 6, Tórshavn

ATKVØÐURÆTTUR
Atkvøðurætt hava øll, sum hava verið tryggingartakarar í felagnum síðani 1. januar 2004.

Tryggingartakarar, har árliga tryggingargjaldið er minni enn kr. 50.000,- hava 1 atkvøðu. Fyri hvørjar byrjaðar kr. 50.000,- í árligum tryggingargjaldi harafturat, fær limurin 1 atkvøðu upp til í alt 10 atkvøður.

Tað ber ikki til at atkvøða við fulltrú.

ATKVØÐUSEÐIL OG TÍÐARFREIST
Atkvøðuseðlar kunnu umbiðjast frá 18. februar 2004 til og við 2. mars 2004 á øllum deildum felagsins. Atkvøðuseðil kann umbiðjast persónliga ella við at ringja til tel 345600, senda fax til 345601 ella teldupost til tf@trygging.fo.

Neyðugt er, at viðskiftafólk, ið persónliga biðja um atkvøðuseðil á deildum felagsins, hava samleikaprógv við sær. Verður atkvøðuseðil umbiðin um tel, fax ella teldupost, er neyðugt at upplýsa um navn/navn á virki, bústað og føðingardag.

Atkvøðuseðilin skal verða latin innaftur á *Høvuðsskrivstovu* felagsins, í seinasta lagi mánadagin 8. mars.

VALÚRSLIT
Tá valúrslitið fyriliggur, verður tað almannakunngjørt í fjølmiðlunum.

Tórshavn, 18. februar 2004
Stjórnin

OGNARFELAG TRYGGINGARTAKARANNA

Kongabrúgvin · Postsmoga 329 · FO-110 Tórshavn · Tel 345600 · Faks 345601 · tf@trygging.fo · www.trygging.fo

www.sansir.fo


Hugnakvøld á Sunda Bókasavni

## Brúgvin um Streymin 30 ár

HUGNAKVØLD
*Tíðindaskriv*

Í sambandi við at brúgvin um Streymin varð 30 ár seinasta heyst, hevur Bókasavnið tikið stig til at savna nakað av tilfarið um tíðina, tá byggingin fór fram.

Hóskvøldið 26. februar klokkan 20 skipar Sunda Bókasavn fyri hugnakvøldið í Høllini í Norðskála-Oyrar skúla, har tilfarið verður lagt fram við fyrilestrum, blaðgreinum, myndasýning og ljósmyndasýning. Í steðginum verður kaffi og køkur at fáa.

Harafturat verða blaðgreinarnar, myndirnar og ljósmyndirnar vístar aftur leygardagin 28. februar og sunnudagin 29. februar, báðar dagarnar frá klokkan 16 til 18.

Øll eru væl komin.



# Rokast til tunnusláttur

**Á dagstovninum Blákollan í Klaksvík gjørdu nøkur av børnunum seg tilreiðar at fara at sláa tunnu, meðan onnur vóru farin í holt við at sláa**

FØSTULÁVINT
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** – Hey, vit mála okkum, sigur ein fittur smádrongur, sum tekur ímóti í barnagarðinum, tá hann varnast, at hurðin gongur.

Inni í stovuni sita børnini og takast við ymiskt. Summi tekna og onnur spæla, meðan tey spent bíða eftir, at øll skulu verða liðug og klár at sláa tunnu.

Uppi á loftinum halda vøggustovubørnini til. Tey eru øll klár at byrja sláttturin. Hendan dagin eru bæði Superman, Batman, Rasmus Tøppur, prinsessur og klovnar í vøggustovu. Sjálv leiðarin er útklødd sum Øskufía.

Børnini vísa vegin inn har, sum tunnan hongur. Ein flott tunna, sum tey sjálvi hava málað. Onkur av børnunum eru so mikið stór, at tey náa upp um tunnuna og at hyggja niður í hana, og tað lýsa stjørnur í eygunum á teimum, tá tey varnast, at okkurt gott er í henni. So ræður bara um at byrja at sláa.

Summi gera greitt beinanvegin, at tey tíma ikki at sláa. Tað verður virt, men nøkur eru øgiliga spent og sláa rættuliga hart. Við ljóðunum frá tunnusláttrinum verður farið niðurundir aftur at vita, hvussu har gongur.

Tey smyrja og lata seg framvegis í. Børnini eru sera tolin og spæla fitt, meðan tey bíða. Um døgurðatíð vita tey, hvør er kattakongur og hevur fingð krúnuna. Og tá fáa tey eisini okkurt lekkurt at eta á stovninum, tí tey hava ikki matpakkar við í dag.



*Í Vøggustovuni høvdu tey borið nakað skjótari at enn í barnagarðinum, so tey byrjaðu at sláa tunnuna, áðrenn hini. Øll vóru ikki líka fegin um tað, men tey flestu vóru spent, tí tey vistu, at okkurt gott lá í tunnuni*



*Ein fitt prinsessa var millum øll tey grýlukløddu børnini í Blákolluni, sum rokaðust við at gera seg klár til tunnusláttturin mánamorgunin*



*Hesin drongurin var íklæddur sum ein kovboy. Hann helt ikki, at tað var so longi at bíða, men sat tolin og spældi, meðan hini rokaðust rundan um hann*


TOYOTA



Nýmótans verkstaður
til nýmótans bilar...

BILSERFRØÐINGAR VIÐ EGNUM BILELEKTRIKARA.
Nýmótans bilar krevja hátøknologiskt viðlíkahald og eftirsýn.
Hetta kann gerast hjá Reyni Service. Umframt øll eftirsýn, klára vit eisini alt tað vanliga.
Ring og bílegg tíð á tel. 353080 ella send teldupost beinleiðis til verkstaðin, sí heimasíðuna www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F
Vegurin Langi • 188 Hoyvík
Tlf. 353040 • Fax 353041
www.reyniservice.fo • rs@reyniservice.fo



EIN ØARVÍSI
MIÐNÁMSÚTBÚGVING

Vit bjóða eina 3-ára yrkisgymnasiala útbúgving, sum gevur atgongd til víðarigangandi og hægri lærustovnar. Tú kanst eisini fara beinleiðis í starv í vinnuni.

Tey, sum heldur ynskja at fara í læru í fiskaídnaðinum ella í alivinnuni, taka støðisárið á skúlanum.

**Ring ella send okkum teldupost og fá meira at vita!**

Fiskivinnuskúlin er m.a. kendur fyri:

- Spennandi næmingaverkætlanir
- Tvær ferðir vunnið europameistaraheitið í "European Business Game"
- Kókibókin "Góður matur úr sjónum", sum næmingar gjørdu,
- Fiskamarknaðir og spennandi uttanlandsferðir

FISKIVINNUSKÚLIN
Postrúm 96 · 350 Vestmanna · Tel. 424573 & 424496 · fax 424428
www.fiskvest.fo · fiskvest@fiskvest.fo

VASTI 457171